## Kastaði kava og varð skotin

Ein 18 ára gamal norðmaður varð seinasta vikuskifti skotin av einum 77 ára gomlum smáttu-granna, sum norðmenn rópa tað. Teir vóru fimm dreingir, sum høvdu leitað sær í eina smáttu í Tårnaby, sum familja til onkran av dreingjunum eiga. Eftir at drongurin hevði kastað kava eftir manni í granna-smáttuni, gjørdi hesin ikki mætari enn, at hann skeyt dreingin, sum var farin at renna fyri lívinum. Skotið rakti dreingin niðarliga í ryggin, men eftir viðgerð á sjúkrahúsi meta læknarnir ikki, at hann fær varandi mein. Tað hevur undrað fólk í grannalagnum og ikki minst familjurnar hjá hesum fimm dreingjunum, at hin 77 ára gamli slapp útaftur úr geglinum næstan beinanvegin eftir avhoyringar hjá løgregluni. Fólk undra seg yvir, at maðurin ikki er skuldsettur fyri drápsroynd. Løgreglan hevur rannsakað húsini hjá hinum gamla og hevur tikið fleiri skotvápn, sum maðurin hevði ólógliga. Norska løgeglan sigur, at tað, sum maðurin gjørdi, var ein avleiðing av eini aðrari hending og sipar til, at hin 18 ára gamli hevði kastað kavað eftir tí 77 ára gamla.





# Heystframsýningin heldur seg sjálva uttanfyri

**Heystframsýningarbólkurin hevur sjálvur tikið seg úr samstarvinum við Listasavnið. Tí eru tey heldur ikki ein náturligur partur av teimum avgerðum, sum verða tiknar á økinum, sambært Helenu Dam á Neystabø, mentamálaráðharra**



*Nýggju ætlaninar um eitt Tjóðsavn eru ein góður máti at skapa frið aftur kring Listasavnið, heldur Helena Dam á Neystabø, mentamálaráðharri*

MENTAN
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað undrar ikki mentamálaráðharran, Helenu Dam á Neystabø, stórvegis, at Heystframsýningarbólkurin ikki er kunnaður um ella hoyrdur í ætlanunum um at leingja setananina hjá Helga Fossadal sum leiðara á Listasavninum.

– Eg kann ikki fara út at hoyra øll møgulig fólk um ætlaninar hjá stýrinum fyri Listasavnið. Eg havi peikað á formannin fyri stýrið, og honum havi eg fult álit á, at tað er rætt at leingja setanina hjá Helga Fossadal nú savnið skal skipast undir einum Tjóðsavni, sigur Helena Dam á Neystabø.

Spurd um bólkurin, har flestu listafakligu førleikarnir í Føroyum er savnaðir, kann kallast »øll møgulig fólk« sigur mentamálaráðharrin

– Nei, men tey hava sjálvi tikið seg úr samstarvinum við Listasavnið og eru tí ikki ein nátúrligur partur av ráðandi organunum á økinum. Eg havi eg spurt meg fyri, har eg skal í hesum málinum.

*Hvar er tað?*

– Hjá formanninum fyri stýrið, og sum sagt havi eg fult álit á honum, slær Helena Dam á Neystabø fast.

### Góður máti at skapa frið.

Sambært mentamálaráðharranum fekk hon eitt tilmæli frá stýrinum fyri Listasavnið, sum mælti til at leingja setanina hjá Helga Fossadal við einum ári, og sum hon tók fult undir við.

Men sum sæst í blaðnum í dag, mótmæla 15 limir í Heystframsýningarbólkinum, at starvsskeiðið hjá Helga Fossadal verður longt í sambandi við arbeiðið at skipa savnið undir einum Tjóðsavni.

Kortini staðfestir Helena Dam á Neystabø, at ætlaninar eru úttrykk fyri, at stýrið fyri Listasavnið og Mentamálaráðið vilja hava frið kring savnið.

– Eg haldi hetta vera ein góðan máta at skapa frið, so allir partar í listaumhvørvinum aftur kunnu kenna seg heima á Listasavninum, sigur Helena Dam á Neystabø, sum ikki er so vís í, at setanin av sitandi leiðara á Listasavninum er einasta orsøkin til ósemjuna.

– Tað eru í øllum førum altíð tveir partar í einum stríði. Meir vil eg siga um hatta stríðið, tí eg kenni ikki nóg nógv til tað.

*Stríðið snýr seg um, at Heystframsýningarbólkurin vil hava ein leiðara á Listasavnið við listafakligari útbúgving ...*

– Sjálvandi skal listarliga fakligheitin inn í slíkum førum og sum eg skilji, verður tað tryggja í nýggja bygnaðinum.

### Óvist við lóggávu

Helena Dam á Neystabø er tó ikki heilt vís í, um altjóða lóggáva fyri søvn eisini fer at vera galdandi fyri nýggja føroyska Tjóðsavnið.

– Tað eri eg ikki før fyri at svara uppá beint nú, tí enn er hetta arbeiði í gongd. Hinvegin eri eg vís í, at Tjóðsavnið fer at liva upp til í øllum førum tær reglur, sum galda á økinum í Norðurlondum.

Spurd um vit kunnu læra nakað av stríðnum, sum stóðst av setanini av sitandi leiðara á Listasavninum, sigur Helena Dam á Neystabø.

– Eg vóni vit kunnu læra ongantíð at lata eitt stríð útvikla seg so oyðileggjandi, sum hetta gjørdi. Tí velji eg eisini nú at hygga 100 ár fram í tíðina heldur enn fimm á aftur, sigur mentamálaráðharrin.

## Myndlistafólk mótmæla

YVIRLÝSING

Undirritaðu myndlistafólk vilja mótmæla teirri avgerð, ið nevndin fyri Listasavn Føroya og Mentamálaráðið hava tikið, at framleingja skeiðið hjá núverandi stjóra, eftir at hann hevur røkt hetta starv í tí 5 ára skeiði, ið fyriskrivað er í reglugerð savnsins.

Sum kunnugt varð núverandi stjóri í síni tíð settur í starv, uttan at samsvar var við orðaljóðið í starvslýsingini um útbúgving og førleika. Vit mótmæltu tá harðliga, tí vit vistu, at hendan starvssetan fór at vera óheppin fyri føroyska myndlist. Sjón er fyri søgn, at gingist hevur, sum vit ávarðaðu um. Sum dømi kann nevnast, at fasta framsýningin í Listaskálanum er sera tilvildarlig og lítið vandin. Í longri tíð hava høvuðsverk eftir okkara fremstu listafólk ikki verið at sæð.

Vit hava nú í tolni bíðað eftir, at hetta 5 ára skeiðið skuldi fáa ein enda í mars 2010, og at lýst síðan skuldi verða eftir nýggjum stjóra við yrkisligum førleika, listarligum innliti og persónligum eginleikum, ið kundi savna allar góðar kreftir um hendan týðandi mentanarstovn og føroyska myndlist yvirhøvur.

Almenna grundgevingin fyri at leingja stjóratíðina er, at bygnaðarligar broytingar skulu gerast í øllum savnsverkinum. At hetta er neyðugt, er eyðsæð, men tað einasta, vit hava fingið at vita um eina tíðarætlan hesum viðvíkjandi er, at eitt uppskot kanska sær dagsins ljós várið 2011 – síðan skal løgtingið viðgera eina komandi savnslóg – og kanska samtykkja hana. Vit fegnast um, at Mentamálaráðið arbeiðir við hesi ætlan, men vit vita av royndum, hvussu seinfør slík tilgongd kann vera, og vit meta tað vera ábyrgdarleyst, at nevnd Listasavnsins og Mentamálaráðið á hendan hátt skjóta eina rímiliga loysn av spurninginum um hóskandi leiðslu fyri Listasavn Føroya út í eina óvissa framtíð.

*Tummas J. Thomsen, Bjarni W. Sørensen, Tóroddur Poulsen, Tróndur Patursson, Brandur Patursson, Torbjørn Olsen, Marius Olsen, Olivur við Neyst, Anker Mortensen, Rannvá Kunoy, Bárður Jákupsson, Hansina Iversen, Hanni Bjartalíð, Aggi Á. Ásgeirsdótttr, Andrias Andreassen.*

Hansina Iversen, formaður fyri Heystframsýningini